# Toyota og PSA felags um kekkiskan bil

**Toyota og PSA (Citroën og Peugeot) hava gjørt eina íløgu upp á 10 milliardir krónur í eina felags bilverksmiðju í Kekkia, ið hevur kapasitet til at framleiða 300.000 bilar árliga. Bilarnir verða frumsýndir á Genéve Motorshow í mars**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Toyota og PSA (Citroën og Peugeot) hava gjørt eina íløgu upp á 10 milliardir krónur í hesa felags bilverksmiðjuna í Kolin í Kekkia*

Tað er við stórum spenningi at bíða verður eftir hesum bilum við fronskum designi, japanskum samlikvaliteti og (vónandi) til kekkiskar prísir.

Toyota bilurin fær navnið Aygo, ið merkir "I go", Citroën bilurin verður teirra minsti og fær tí navnið C1, meðan Peugeot bilurin kemur at eita 107 og verður ivaleyst avloysarin fyri Peugeot 106.

Hóast bilarnir verða gjørdir á sama samlibandi, verða teir ikki heilt eins at síggja til. Allir hava teir hvør síni sereyðkenni.

Tveir ymiskir sera framkomnir og orkusparandi motorar verða at velja í millum: 1,0 bensin og 1,4 diesel.

Til støddar verða bilarnir umleið 340 cm langir, 163 cm breiðir og 147 cm høgir. Tað vil siga, at teir verða minni enn t.d. Toyota Yaris.

Allir tríggir bilarnir verða gjørdir á eini felags verksmiðju í Kolin, 40 km eystan fyri kekkiska høvuðsstaðin Prag.

Verksmiðjan kostaði 10 milliardir krónur at byggja. Har arbeiða 3.000 fólk, sum kunnu framleiða 300.000 bilar árliga.

Bilarnir verða frumsýndir á Genéve Motorshow í mars 2005, og fyrstu bilarnir kunnu royndarkoyrast í apríl. Prísin vita vit tó einki um enn.




*Toyota bilurin fær navnið Aygo, ið merkir "I go"*




*Peugeot bilurin kemur at eita 107 og verður ivaleyst avloysarin fyri Peugeot 106*




*Citroën bilurin verður teirra minsti og fær tí navnið C1*

# C6 verður flaggskipið hjá Citroën

**Citroën eru um at vera klárir við avloysaranum fyri fyrrverandi XM-seriuna. Talan verður um Citroën C6, sum kemur á marknaðin seinni í ár. Bilurin verður væntandi frumsýndur á Genéve Motorshow í mars**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*





*C6 verður ein stórur luksusbilur við komforti á høgum støði og Hydrakiv-3 fjaðraskipan. Bilurin verður væntandi frumsýndur á Genéve Motorshow í mars*

Citroën hava í nøkur ár ikki havt nakað veruligt flaggskip, sum t.d. luksusbilin Citroën XM, ið gekk út í 2001.

Á Genéve Motorshow í mars verður nýggi luksusbilurin Citroën C6 væntandi frumsýndur.

C6 verður ein stórur luksusbilur við komforti á høgum støði og við framkomnu Hydrakiv-3 fjaðraskipanini.

Millum størru motorarnar vera t.d. ein 3,0 litur V6 bensin og ein 2,7 litur V6 diesel.

## Ársins »off-roadari«



Toyota LandCruiser er kosin "Ársins off-roadari 2005" av stóra bilblaðnum "Offroad". 28,4 prosent av lesarum blaðsins valdu LandCruiser.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Daewoo framgongd í Evropa



Suðurkoreansku Daewoo, sum nú verða seldir undir navninum Chevrolet, høvdu eina framgongd upp á heili 42 prosent í Evropa í 2004. Verksmiðjan, sum verður stýrd av General Motors, framleiddi 900.000 bilar í fjør í mun til 580.000 í 2003

*Kelda: Motor Magasinet*

## Audi Quattro 25 ár



Tá altjóða bilaframsýningin Genéve Motorshow letur upp fyrst í mars, kann Audi hátíðarhalda at 25 ár eru liðin síðan fyrsti Audi Quattro (4x4) bleiv sýndur fram fyrstu ferð á Genéve Motorshow fyri júst 25 árum síðan

*Kelda: Motor Magasinet*